skemt




# Tel upp í 10 – ella 8

Tann, sum skrivaði myndatekstin til hesa myndina, ið liggur í myndasavni á Portalinum, hugdi neyvan nóg væl eftir myndini. Jú, víst fekk Tjóðveldi átta tingfólk á løgtingsvalinum fyri viku síðani, men "tey átta tingfólkini" eru tó ikki øll á myndini.



## Jól alt árið

**Ein gløggur surfari á netinum hevur funnið fram til, at tað ber til at senda jólafjarrit í Útvarpinum langt út í januar. Í øllum førum hevði heimasíðan hjá Útvarpinum nú um dagarnar framvegis eina tænastu til fólk, sum vilja senda jóla- og nýggjársfjarrit. Spurningur er so, um tað er til farnu jólini ella tey komandi.** Kelda: Nym.fo

## Leyst og fast um stórt og smátt

Fyrr hevði Postverkið veitingarskyldu, nú hava teir bara tagnarskyldu.

Gamalt var at bera yvir við mistøkum - ikki at bera tey út!

Faldarin bleiv, ið hvussu er borin kristiliga út til øll húski!

Fransmenn kunnu senda kjarnorkuavfallið við Postverk Føroya. Teir slatra ikki, hvør eigur tað.

Lýsingarnar fáa ein kappingarneyta til næsta val. Dulnevnd addressuleys lesarabrøv.

Í 1918 høvdu vit addressumálið. 90 ár seinni hava vit fingið ADDRESSULEYSA málið.

Sjálvandi vil Poul Michelsen FRYSTA blokkin. Hann hevur kapasitetin.

# Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.*

**Einmansherur – sjálvandi hálvur føroyingur**
Lindberg hølvaði Kroatia av
Portalurin

**Tað má vera rundur fiskur**
Sundaberg hevur rundað tey 100 tonsini
Vikublaðið

**Rudda forsíðuna**
Oljuleitingar í Grønlandi kunnu oyðileggja umhvørvið
Dimma

**Havið sjálvi bát við**
Opið neyst fyri øllum áhugaðum leygardagin
Norðlýsið

**Gongur skeivan veg**
Løgtingið vorðið tvey ár yngri
Dimma

**Tað gongur galið**
Bremsilongdin er 30 ár
Vinnuvitan

# Pssst, minst til børnini



Russiski forsetin gav sær stundir til at lurta eftir, hvat hendan gentan hevði at siga, tá ið hann vitjaði í einum ítróttardepli í russiska býnum Penza. Seks vikur eru til forsetavalið í Russlandi, og tað kann verða, at hendan gentan kundi geva Putin onkur góð ráð um valstríðið. (Mynd: Putin)